# Kunning um ólavsøkuna




## um ferðslu á ólavsøku

**Ólavsøkukonsertin** er fríggjadagin 25. juli, kl 19.00 – 02.00 í Tórsgøtu. Í hesum sambandi er Tórsgøta stongd frá Sverrisgøtu oman í Vágsbotn frá mikudagnum 23. juli, kl. 19.00 til leygardagin 26. juli, kl. 9.00.

**Súkklukapping** er sunnudagin 27. juli, kl. 14.30 – 17.30. Í hesum sambandi verður ferðslan til handilsøkið á Hálsi nógv tarnað. Heykavegur, Staravegur, Falkavegur og Tjaldursvegur verða stongdir.

**Kappróðurin** er ólavsøkuaftan 28. juli, kl. 14.00 – 19.00. Tá er Eystara Bryggja stongd fyri vanligari bilferðslu frá Kongabrúnni til Jónas Boncks gøtu. Somuleiðis er ikki loyvt at parkera á parkeringsøkinum á Bursatanga frá 27. juli, kl. 20.00 til ólavsøkudag kl. 9.00.

**Annars eru hesar broytingar í ferðsluni.**

Ólavsøkuaftan 28. juli, kl. 14.00 - kl. 8.00, morgunin eftir, umframt ólavsøkudag 29. juli, kl. 10.00 - 8.00, morgunin eftir, er bilferðsla ikki loyvd:

Eftir Kopargøtu, á Áarvegnum og niðan á Vaglið, í Mylnugøtu, í Vágsbotni frá standmyndini til Skálatrøð, í Niels Finsensgøtu frá Vaglinum niðan til Auto, í Tórsgøtu frá Niels Wintersgøtu oman í Vágsbotn og í Niels Wintersgøtu.

Parkering er heldur ikki loyvd á hesum økjum.

Vanlig bilferðsla er ikki loyvd tvørtur um Niels Finsensgøtu á vegamótinum Bøkjarabrekka/Steinatún. Undantiknir eru hýruvognar, Bussleiðin og Bygdaleiðir. Um hetta vegamótið gongur nógv fólk, tí má koyrast við størsta varsemi.

Í Niels Wintersgøtu, í Steinatúni og í Bøkjarabrekku er loyvt hýruvgnum at søkja sær hýru.

**Bussleiðin koyrir soleiðis:**

Ólavsøkuaftan 28. juli og ólavsøkudag 29. juli, koyrir Leið 1 oman eftir Dalavegnum í staðin fyri Varðagøtu/Tróndargøtu.

Ólavsøkuaftan koyrir Leið 1 seinasta túr av Hamrinum kl. 13.53, Leið 2 koyrir seinasta túr av Argjum kl. 14.05 og Leið 3 koyrir seinasta túr av Norðasta Horni kl. 14.05.

Ólavsøkudag koyrir Leið 1 fyrsta túr kl. 11.53 og Leið 2 og 3 koyrir fyrsta túr kl. 12.05. Síðan verður koyrt sum sunnudag.

## WC á ólavsøku

Vesi er á hesum støðum í býnum:

Á Farstøðini, undir Bryggjubakka, í Mylnugøtu, í Steinatúni, í Kommunuskúlagarðinum og á parkeringsøkinum við J. Paturssonargøtu.

## undir miðnáttarsanginum

Samarittarnir hjá Reyða krossi eru á Vaglinum á trimum støðum, soleiðis at tað altíð ber til at veita skjóta hjálp.

Telefon 112 ella 351448

Ansið væl eftir tykkum og tykkara næstrafólki.

Sanghefti til miðnáttarsangin á ólavsøku eru at fáa í Ráðhúsinum og í Býráðssalinum, meðan opið er ólavsøkudag millum kl. 15.00 og 18.00. Eisini fáast sanghefti í sambandi við sangløtuna. Tá fara skótar at býta út á trappuni uttanfyri Býráðssalin og við Tingshúsvøllin.

## á ólavsøku

Móttøkuhúsið hjá Tórshavnar kommunu í Tróndargøtu er opið ólavsøkudag millum kl. 15.00 og 18.00. Høvi verður at síggja listasavnið í húsinum. Ráðhúsið og Býráðssalurin er opin ólavsøkudag millum kl. 15.00 og 18.00.

Fløskumóttøka er skipað omanfyri Kiosk Steinatúni.

Góða ólavsøku!

**Tórshavnar kommuna**